# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Leivur Olsen 65 ár



Hósdagin 5. januar fyllir Leivur Olsen, Hoyvík, 65 ár. Leivur er føddur í Kvívík í 1941 og vaks upp har. Foreldrini høvdu telefonstøðina í Kvívík og har kom, sum vera man, nógv fólk á gátt. Í 1958 leitaði Leivur sær til Havnar á háskúla. Árið eftir fór hann í læru hjá Thomas Dam. Enn í dag minnast mong henda fryntliga lærlingin, og handilslívið skuldi eisini gerast hansara lívsleið.

Eftir lokna lærutíð arbeiddi hann ymsastaðni, til hann fyrst í sjeytiárunum byrjaði sum sjálvstøðugur sølumaður, og Leivur hevur virkað sum slíkur síðani. Sum ferðandi sølumaður í eini 35 ár er Leivur kendur í nærum hvørjum króki í landinum.

Leivur giftist við Marnu, fødd Dam, úr Sandavági í 1965. Tey taldust millum teirra, sum bygdu í Hoyvík fyrst í sjeytiárunum, tá Hoyvíkin enn lá nakað uttan fyri Havnina. Tey eiga synirnar Dagfinn (f.1967) og Theodor Eli (f. 1976).

Leivur hevur gingið høgt uppí familjuna og synirnar. Av lyndi er hann hjálpsamur og fryntligur og tolsemi er eitt eyðkenni. Hetta vátta óivað tey, ið kenna hann. Men familjan er altíð komin í fremstu røð, og enn sum áður er hann beinanvegin til reiðar, um okkurt er, ið hann kann vera til hjálpar við. Í dag fegnast hann um abbadøturnar báðar, Torgerð og Elisu.

Leivur og Marna ganga høgt upp í hús og urtagarð, og einum nýtist ikki at hyggja so longi at vakra urtagarðinum á Mýrini, fyri at fáa eyguni upp fyri, at her eru fólk, ið ganga upp í at fríðka um, og at nógvir arbeiðstímar liggja aftan fyri vøkru sjónina.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Óli Jóhan Samuelsen** í Vági andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi 2. januar, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni

**Hilmar Heinesen,** Tórshavn, andaðist leygardagin 31. desember, 61 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13.

**Beinir Holm**, Tvøroyri, andaðist nýggjársaftan, 76 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin klokkan 13.00.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

**Dagurin í morgin**
**5. januar. Símeon**. Halgimenni úr Kilikiu í Lítluasia, sum doyði í árinum 459. Fekk navnið Stylites, tá ið hann í 422 fekk sær tilhald á einari 6 alin høgari súlu. Súla eitur stylos á grikskum. Hebráiska navnið Shimon er av somu rót sum navnið Sámuel og merkir lítli Sámal.

## Óli Jacobsen fiskimanna-felagsformaður í 35 ár



5. januar 1971 fekk Føroya Fiskimannfelag nýggjan formann. Talan var um Óla Jacobsen, sum nú hevur siti sum formaður í felagnum 35 ár.

Hann tók við eftir Erlend Patursson, sum tá hevði sitið sum formaður í 15 ár.

Til formansvalið vóru vóru trý valevni: Erlendur Patursson í Havn, Óli Jacobsen í Norðragøtu og Johan Hendrik Joensen í Sumba.

Óli var valdur við 500 atkvøðum, Erlendur fekk 464, og Johan Hendrik fekk 56 atkvøður. Tilsamans 1145 fiskimenn greiddu atkvøðu.

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1971*